# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Ingibjørg Jacobsen 70 ár

Góða Ingibjørg!

Tá ið ein er í familjuni, sum dugir væl at halda røðu, so hevur restin av familjuni ein trupulleika, tá ið røðarin skal feirast.

Mær nýtist ikki at siga tykkum, hvussu nógvar góðar røður Ingibjørg hevur hildið, og tá ið eg plagi at siga við hana, sum tú dugir væl at halda røðu, so svarar hon, tað er tí eg havi so góða tíð. Tit gera alla restina, og so kann eg halda røðu. Hon plagar eisini at siga, tit skulu ikki stúra, tað kann eg taka mær av.

Eg má so siga í dag, at eg havi ikki fingið serliga góða tíð, tí Ingibjørg hevur alla tíðina sagt, at hon fór ongan føðingardag at halda, men knappliga í síðstu viku ringir Gunnvør til mín og sigur, at mamma sigur nú, at hon heldur tað hevði verið so hugnaligt at hildið ein føðingardag. Av tí at vit kenna so nógv fitt fólk, so hevur eydnast okkum at stápla henda dagin upp á beinini.



*Ingibjørg og Karin*

Ingibjørg er stórasystir hjá mær. Hon er 9 ár eldri, og sum eg minnist Ingibjørg, hevur hon altíð verið vaksin. Tjenti pengar, eg fekk onkuntíð oyra frá systur míni, tað vóru tað ikki nógvar av vinkonunum hjá mær, sum fingu. Ingibjørg var álitið hjá mammu, tá ið pápi fall frá, og eg havi hugsað seinni, tá ið eg sjálv gjørdist vaksin, at Ingibjørg var ikki meir enn 23 ár, tá ið hon fekk alt tað fíggjarliga hjá mammu í eina legu, so mamma kundi gjalda hvørjum sítt. Eg ivist ikki í, at Poli eisini var ein hjálp, men eg haldi tað var væl klárað av Ingibjørg og mammu.

Serliga minnist eg, hvussu væl hon dugdi og dugir at klæða seg, og hvør minnist ikki, tá ið Ingibjørg og Pole fóru sveimandi eftir dansigólvinum. Ja minnini, tey eru altíð vøkur, og eitt er vist, at hóast Ingibjørg hesi seinastu árini hevur fingið nógvar smeitir, so eru fleiri góðar enn ringar løtur at minnast aftur á.

Ingibjørg búði heima, til hon og Pole í 60-unum fluttu í Gundadal. Har komu Einar, Jórun og Gunnvør hvør aftan á øðrum, og hjá okkum, mammu og mær, var tað gott, at børn komu, og at vit sluppu at vera partur av teirra lívi. Eg minnist, at eg passaði Einar eitt skifti, tí tá var barnsburðarfarloyvi bert 5 vikur, og av tí at eg gekk so nógv í býnum við vogni, helt onkur, at eg átti hann. Men tit skilja meg, eg tímdi ikki at sita uppi í Gundadali allan dagin, tað var alt ov uttanhandað.

Eg flutti heim við mínari familju í 1979, og tað var ein stór hjálp hjá Tollaki og mær, at Ingibjørg og Pole vóru í Havnini. Poli hevði umboðað okkum í sambandi við grundstykki, sum mann tá ið tíðini ikki mátti lata gleppa sær av hondum, og Ingibjørg legði mær eina við trý ting, tá ið vit teknaðu hús. Góðar trappur niður í kjallaran, góðan vaskikjallara, og at sleppa frá at fara út, tá ið eg skuldi í hjallin.

Vit eiga, sum tit vita, eina systur afturat, hon er nr. 2, og eg havi lisið onkrastaðni, at tað er ræðuligt at verða genta nr. 2. Grundin til, at mamman er so glað, tá ið genta nr. 2 kemur, er, at so kann hon brúka avlagda toyið hjá stórusystur. Hetta var helst galdandi fyrr.

Mær dámar betur myndina, at stórasystir sigur tær, hvat tú ikki skal, men um onkur annar ger tað sama, so forsvarar hon teg av øllum alvi.

Eg fari at enda við at ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, eg vildi ynskt, at tíni eftirlønarár vóru lættari, men vit eru ikki harrar yvir lagnuni.

*Karin*

Fyri 35 árum síðan:

# Tíggju innbrot í tvær vikur

Á baksíðuni á Sosialinum leygardagin 18. januar 1975 stendur, at ikki færri enn 10 innbrot hava verið í Havn síðan 4. januar, upplýsir Hjalgrím Magnussen, støðleiðari á Politistøðini í Havn, fyri blaðnum. Brotið hevur verið inn í kioskir og handlar í býnum.

Støðleiðarin nevndir t.d. at mikunáttina varð brotið inn í kioskina hjá Poul Lamhauge á Vaglinum, har góðgæti fyri 400 krónur varð stolið, og fyrri í vikuni varð brotið inn í Mótabúðina í Sverrisgøtu, har nakrar taskur vóru stolnar.

*Kelda: Sosialurin leygardagin 18. januar 1975*



Sosialurin

10 innbrot í Havn seinastu 14 dagarnar

Avhoyringarnar í samband við ... við SOSIALIN

... tonsari til Elduvíkar

## Dagurin

**20. januar. Brøðramessa.** Hildin til minnis um teir báðar Fabianus og Sebastianus. Teir eru ikki brøður, men vórðu fyri trúar sakir tiknir av døgum sama dag í árinum, Fabanus, sum var pávi, umleið ár 250, og Sebastianus – kristin hermaður – umleið ár 288. Tað sigst, at teir báðir eru jarðaðir undir tí núverandi kirkjuni San Sebastian í Róm. Fabianus er rómverskt ættarnavn. Sebastianus er upprunaliga grikst navn, ið merkir heiðurverdur.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Johannes Dahl Hovgaard, vanliga nevndur Johannes hjá Hassa**, ættaður úr Vági, búsitandi í Haderslev, andaðist hósdagin, 62 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Åstrup Kirke, Åstrup Allé 21 í Haderslev fríggjadagin kl. 11.

**Hjalti Joensen, Hvannasund,** andaðist mánadagin, 74 ára gamal.

**Iva Saloma Hansen, fødd Olsen, ættað úr Hósvík, búsitandi við Norðskála**, andaðist mánadagin 18. januar á Landssjúkrahúsinum, 88 ára gomul.

**Mary Margreth Jacobsen, vanliga nevnd Pat**, gift við Klæmint Jacobsen, Tórshavn, andaðist í Newcastle Upon Tyne, sunnudagin, 90 ára gomul.

Reynhold Nielsen, Tvøroyri, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum, mánadagin, 62 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra móðir, vermóðir, omma og langomma okkara

**Anna Hansina Elisabeth Samuelsen**

andaðist á Eldrasambýlinum í Kollafirði týsdagin 19. januar, 97 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Zion í Kollafirði fríggjadagin 22. januar kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Trygvi**

## Merkisdagar

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 23. jan. fyllir Tummas Lauritsen seksti. Dagurin verður hildin við hús á Tvørgarði 31 í Miðvági frá kl. 18. Vælkomin.

**Diamantbrúdleyp**
28. jan. kunnu hjúnini Diana og Alfred Klein, Fuglafirði, halda diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 30. jan., kl. 16, har øll eru vælkomin. Fólk verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 23. jan. á tlf. 444092.

**Diamantbrúdleyp**
Fríggjadagin 26. feb. hava hjúnini Heinina og Sigurd Gaard Hansen diamantbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin tann 27. feb. kl. 17 í Royndarhúsinum í Nólsoy. Tey, sum vilja gleðast saman við okkum, verða biðin um at siga frá á tlf. 327145 ella 527145 innan 7. feb.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 2. feb. hava Jóhan Petur S. og Lis Olsen silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í kafeteria í Kelduni í Skálafirði týskvøldið 2. feb. frá kl.18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 16. jan. *giftust* Birita Petersen og Bjarni Hansen, Nólsoy.

**Brúdleyp**
Leygardagin 23. jan. kl. 15 giftast í Hoyvíkar Kirkju Tóra Simonsen, Saltangará, og Herbert í Lon Jacobsen, Hoyvík. Vælkomst verður heima við hús frá kl. 19, har øll eru hjartaliga vælkomin.